# Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags

Skrás. nr. 3000

Roknskapur fyri tíðarskeiðið
1. januar - 30. juni 2019

# Innihaldsyvirlit

| | |
|---|---|
| Upplýsingar um grunnin | 2 |
| Frágreiðing til roknskapin | 3 |
| Roknskaparátekning leiðslunar | 6 |
| Nýttar roknskaparreglur | 7 |
| Rakstrarúrslit fyri tíðarskeiðið 1. januar - 30. juni | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 11 |

# Upplýsingar um grunnin

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags
Stoffalág 60
FO-100 Tórshavn

Telefon 354800
Telefaks 354801

www.handverk.fo

handverk@handverk.fo

Skrásetingar nr.: 3000

Heimstaður: Tórshavn

**Nevnd:**
Sofus Joensen, formaður
Eli Brimsvík, næstformaður
Jóhan J. Lamhauge
Jan Otto S. Holm
Dánial Pauli Djurhuus

**Stjórn:**
Petur Juul Jacobsen

**Ábyrgdarhavandi tryggingarfrøðingur:**
Steen Ragn, cand. act., SB Aktuar

**Grannskoðari:**
SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f

**Peningastovnar:**
P/F BankNordik
P/F Eik Banki

# Frágreiðing til roknskapin

## Endamál grunnsins

Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags hevur til endamáls at reka eftirlønarvirksemi sambært viðtøkurnar fyri grunnin. Grunnurin er sjálveigandi stovnur.

## Týdningarmiklar hendingar og úrslitið fyri fyrra hálvár 2019

### *Eftirlønarinngjøld*

Í 1. hálvári eru inngoldnar 15,5 mió.kr. í eftirlønargjøldum. Sama tíðarskeið í 2018 vórðu 14,1 mió.kr. inngoldnar. Sostatt er talan um ein vøkstur í inngjøldunum á umleið 1,4 mió.kr. Hetta er umleið 10%.

Nýggja eftirlønarlógin heimilar, at í mesta lagi ein triðingur av lógarásetta eftirlønarinngjaldinum, kann nýtast til keyp av tryggingum. Eftirlønarinngjøldini til grunnin eru fyri limir í fimm fakfeløgum. Hesi fimm feløgini hava tryggingaravtalu við tryggingarfelag fyri sínar limir. Feløgini hava gjørt av, at gjaldið fyri trygginginga, skal takast av eftirlønarinngjøldunum. Grunnurin tekur gjaldið fyri tryggingina av inngjaldinum, og avroknar við Havnar Handverkarafelag, sum stendur fyri tryggingini. Gjaldið verður einans tikið av, um tað er í trá við ásetingarnar í eftirlønarlógini, og um peningur er til tað. Grunnurin hevur einki við sjálva tryggingina ella tryggingaravtaluna at gerða, og er tí leysur av allari ábyrgd.

### *Eftirlønarútgjøld*

Í 1. hálvári eru útgoldnar góðar 3,8 mió. kr. í eftirlønum. Sama tíðarskeið í 2018 vórðu umleið 2,6 mió.kr. útgoldnar.

Umleið 3.064.000 kr. eru goldnar frá persónligari konto og umleið 751.000 kr. eru goldnar frá lutaeftirløn og solidariskari skipan. Av hesum eru umleið 227.000 kr. leypandi útgjøld.

### *Rakstrarútreiðslur*

Í 1. hálvári eru rakstrarútreiðslurnar umleið 1,1 mió.kr. Umleið 0,8 mió.kr. til lønir og umleið 0,3 mió.kr. til fyrisiting.

Sama tíðarskeið í 2018 vórðu rakstrarútreiðslurnar umleið 1,0 mió. kr.

### *Íløguvirksemi*

Grunnurin hevur í 1. hálvári 2019 havt ein vinning á 15,9 mió. kr. av sínum íløguvirksemi. Sama tíðarskeið 2018 varð úrsliti ein vinnigur á 4,4 mió.kr. Gongdin við virðisbrøvunum fyrra hálvár 2019 hevur verið góð. Serliga hava partabrøvini staðið seg væl.

### *Úrslitið í tíðarskeiðinum*

Nettoúrslitið 1. hálvár 2019 er eitt hall á 11,9 mió.kr.

# Frágreiðing til roknskapin

### *Eftirlønaravsetingar*

Eftirlønaravsetingarnar eru 339,2 mió.kr. pr. 30/6-2019. Við ársbyrjan 2019 vórðu hesar umleið 303,3 mió. kr.

Tær 339,2 mió.kr. viðvíkja avsetingum til solidariska skipan og pensjónskontur.

**Váðar og úrslit fyri seinna árshelming 2019**
Grunnurin væntar á leið somu gongd í eftirlønarinngjøldunum sum fyrra hálvár 2019. Hendan meting byggir á gongdina fyrra hálvár og tær ábendingar, sum fyriliggja um virksemi og umstøðurnar í samfelagnum annars.

Ársúrslitið verður merkt av hvussu gongdin verður á fíggjarligu marknaðunum. Gongdin við virðisbrøvunum hevur sum nevnt verið góð fyrra hálvár 2019. Higartil í seinnu hálvu hevur gongdin verið góð, og grunnurin væntar tí eitt rímuliga gott úrslit av íløgunum fyri 2019.

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar hendingar farnar fram, sum ávirka metingina fyri restina av árinum.

**Inngjøld í 2000 og 2001**
Sambært roknskapinum eru framvegis 1.273 tkr. í inngjøldum frá arbeiðsgevarum frá 2000 og 2001, sum ikki hevur verið møguligt at fáa eyðmerkt á ávísar persónar. Orsakað av at nevndu eftirlønargjøld eru móttikin uttan tilskilan av, hvør eigur tey, er ein ávísur vandi fyri, at grundarlagið fyri uppgerðini av eftirlønaravsetingum ikki er røtt.

### *Onnur viðurskifti*

Metlága rentustigið og longd livitíð hevur givið grunninum avbjóðingar við at halda sett solvenskrøv. Arbeitt verður miðvíst við at loysa hesar avbjóðingar.

Grunnurin hevur í hálvárinum verið partur av transaktiónum við Havnar Handverkarafelag, á íalt kr 2,3 mió.

# Frágreiðing til roknskapin

## Útvald høvuðs- og lyklatøl

| | Fyrri árshelmingur 2019 | Fyrri árshelmingur 2018 | Árið 2018 |
|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | |
| Eftirlønargjøld | 15.573 | 14.107 | 28.765 |
| Útgoldin eftirløn | -3.815 | -2.627 | -6.351 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 15.925 | -4.482 | -17.175 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -1.098 | -1.007 | -1.848 |
| Úrslit | -11.918 | -499 | -776 |
| **Fíggjarstøða** | | | |
| Limakontur | 30.715 | 28.237 | 28.108 |
| Eftirlønaravsetingar | 339.291 | 305.588 | 303.394 |
| Eginogn til samans | -5.934 | 6.261 | 5.983 |
| Ogn í til samans | 371.535 | 350.756 | 346.326 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Avkast | 4,6% | -1,3% | -4,9% |
| Kostnaður í prosent av eftirlønargjøldum | 7,0% | 7,1% | 6,4% |
| Solvensdekningur | 107% | 148% | 141% |

# Roknskaparátekning leiðslunar

Stjórn og nevnd hava í dag viðgjørt og viðtikið roknskapin fyri tíðarskeiðið 1. januar - 30. juni 2019.

Roknskapurin fyri tíðarskeiðið 1. januar - 30. juni 2019 er gjørdur í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi, kunngerðina um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum, og viðtøkur grunnsins. Vit meta, at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunnsins ognum, skuldum, fíggjarligu støðu 30. juni 2019 og av úrslitinum av virksemi grunnsins í tíðarskeiðnum 1. januar - 30. juni 2019.

Roknskapurin er ikki grannskoðaður ella gjøgnumgingin (review) av grannskoðara felagsins.

Tórshavn hin 23. september 2019

Stjórn:

Petur Juul Jacobsen

Nevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Sofus Joensen<br>*formaður* | Eli Brimsvík | Jóhan J. Lamhauge |
| Jan Otto S. Holm | Dánial Páll Djurhuus | |

# Nýttar roknskaparreglur

## Alment
Roknskapurin fyri Eftirlønargrunn Havnar Handverkarafelags er gjørdur í samsvari við lógina um tryggingarvirksemi, kunngerðina um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum, og viðtøkur grunnsins.

Nýttu roknskaparreglurnar eru tær somu sum í ársroknskapinum.

## Eftirlønargjøld
Eftirlønarinngjøldini fevna um tey í tíðarskeiðnum inngoldnu gjøld.

Eftirlønarútgjøld fevna um veitingar í roknskapartíðarskeiðnum.

Tær tryggingarteknisku avsetingarnar til eftirlønirnar eru ásettar og góðkendar av aktuarinum út frá tí galdandi tryggingartekniska grundarlagnum. Hesar avsetingar, sum eru skyldur hjá grunninum mótvegis tryggingartakarunum, eru settar sum skyldur í fíggjarstøðuni.

Í rakstrarroknskapinum verður broytingin í teimum tryggingarteknisku avsetingunum førd.

## Fíggjarvirksemi
Fíggjarinntøkurnar fevna um rentur, sum umfata roknskapartíðarskeiðið, av innistandandi í peningastovnunum, útlánum og virðisbrøvum. Harumframt fevna fíggjarinntøkurnar um staðfestar og ikki staðfestar kursvinningar og kurstap.

## Skattur
Eftirlønargrunnur Havnar Handverkarafelags er ikki skattskyldugur.

## Fíggjarstøðan
Virðisbrøv, sum eru skrásett á virðisbrævamarknaði, verða virðisásett til kursin 30. juni í roknskapartíðarskeiðnum. Nærum øll virðisbrøv í roknskapinum 30. juni 2019 eru skrásett á virðisbrævamarknaði.

Eftirlønaravsetingar verða avsettar grundaðar á aktuarútrokningar.

# Rakstrarúrslit fyri tíðarskeiðið 1. januar - 30. juni

| | Nota | 2019 | 2018 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **Eftirlønargjøld** | | | |
| Eftirlønargjøld | | 17.798.390 | 16.215.228 |
| Endurtryggingar | | 0 | 0 |
| Nýtt til tryggingar | | -2.224.763 | -2.107.979 |
| Eftirlønargjøld, netto | | 15.573.627 | 14.107.249 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 1 | 3.669.685 | 6.296.385 |
| Virðisjavningar | 2 | 12.256.225 | -10.778.525 |
| **Úrslit av íløguvirksemi til samans** | | **15.925.910** | **-4.482.140** |
| | | 31.499.537 | 9.625.109 |
| Útgoldnar veitingar | | 3.815.636 | 2.627.084 |
| Broyting í limakontum | | 2.606.958 | 602.629 |
| Broyting í eftirlønaravsetingum | | 35.897.055 | 5.887.336 |
| Útgoldnar veitingar og broyting í avsetingum til samans | | 38.504.013 | 9.117.049 |
| Lønir | | 775.097 | 535.429 |
| Fyrisitingarútreiðslur | | 323.095 | 471.879 |
| Rentuútreiðslur o.l. | | 0 | 0 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | | **-11.918.304** | **-499.248** |
| Skattur av ársúrsliti | | 0 | 0 |
| **Rakstrarúrslit** | | **-11.918.304** | **-499.248** |

# Fíggjarstøða

| | 30. juni 2019 | 31. desember 2018 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| **OGN** | | |
| **Fíggjarligar íløguognir** | | |
| Kapitalpartar | 101.103.341 | 89.171.814 |
| Íløguprógv | 28.858.259 | 20.751.793 |
| Lánsbrøv | 220.870.652 | 204.531.145 |
| Onnur útlán | 1.500.000 | 0 |
| Innlán í kredittfeløgum | 19.203.028 | 31.871.965 |
| **Fíggjarliga íløguognir til samans** | **371.535.280** | **346.326.217** |
| **OGN TIL SAMANS** | **371.535.280** | **346.326.717** |

# Fíggjarstøða

| | | 30. juni 2019 | 31. Des. 2018 |
|---|---|---|---|
| | | kr. | kr. |
| **SKYLDUR** | | | |
| **Eginogn** | | | |
| Flutt frá undanfarnum árum | | 5.983.904 | 6.760.420 |
| Úrslit fyri tíðarskeiðið | | -11.918.304 | -776.516 |
| **Eginogn til samans** | 3 | **-5.934.400** | **5.983.904** |
| **Ábyrgdarlán og limakontur** | | | |
| Ábyrgdarlán | 4 | 5.000.000 | 5.000.000 |
| Limakontur | | 30.715.051 | 28.108.093 |
| **Ábyrgdarlán og limakontur til samans** | | **35.715.051** | **33.108.093** |
| Eftirlønaravsetingar, pensjónskontur | | 276.435.462 | 252.972.839 |
| Eftirlønaravsetingar, solidariskar | | 62.856.512 | 50.422.080 |
| **Eftirlønaravsetingar til samans** | 5 | **339.291.974** | **303.394.919** |
| **Skuld** | | | |
| Ikki sundurbýttar inngjaldingar | | 1.273.186 | 1.273.186 |
| Onnur skuld | | 1.189.469 | 2.566.615 |
| **Skuld til samans** | | **2.462.655** | **3.839.801** |
| **SKYLDUR TIL SAMANS** | | **371.535.280** | **346.326.717** |

# Notur til roknskapin

## 1 Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m.

| | 30. juni 2019 | 30. juni 2018 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Rentur av virðisbrøvum og innlánum | 1.451.019 | 2.131.764 |
| Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 2.218.666 | 4.164.621 |
| | 3.669.685 | 6.296.385 |

## 2 Virðisjavningar

| | | |
|---|---|---|
| Ikki staðfest – virðisbrøv | 11.751.433 | -9.775.845 |
| Staðfest – íløguprógv | -265.250 | -629.458 |
| Staðfest – lánsbrøv | 770.042 | -373.222 |
| | 12.256.225 | -10.778.525 |

## 3 Eginogn

| | 30. juni 2019 | 31. desember 2018 |
|---|---|---|
| | kr. | kr. |
| Eginogn 1. januar | 5.983.904 | 6.760.420 |
| Flutt úrslit fyri tíðarskeiðið | -11.918.304 | -776.516 |
| **Eginogn 30. juni** | -5.934.400 | 5.983.904 |

# Notur til roknskapin

4 **Ábyrgdarlán**

Ábyrgdarlánið frá Havnar Handverkarafelag var rentu- og avdráttarfrítt til 31. desember 2015. Sambært avtaluni skuldi í seinasta lagi hin 31. desember 2015 verða gjørd ein avtala um, hvørt ábyrgdarlánið skal afturgjaldast og hvussu lánið skal forrentast og afturgjaldast.

Nýggj avtala varð gjørd í november 2015, sum er treytað av góðkenning frá Tryggingareftirlitinum. Sambært nýggju avtaluni skal grunnurin gjalda 1 mió.kr. aftur um árið í 2016, 2017, 2018 og 2019. Í fyrsta lagi í januar 2025 skal avtala gerast um hvørt seinasta milliónin skal gjaldast aftur. Nýggja avtalan er send Tryggingareftirlitinum til góðkenningar. Eingin peningur er goldin, og eingin góðkenning fyriliggur frá Tryggingareftirlitinum.

Við tað at Tryggingareftirlitið ikki hevur góðkent nýggju avtaluna, verður ábyrgdarlánið í síni heild roknað við í uppgerðini av grundarfæfeingi grunsins.

Havnar Handverkarafelag hevur í sambandi við ársfrásøgnina fyri 2018 váttað, at ábyrgdarlánið í fyrsta lagi skal rindast aftur eftir ársløh 2023.

5 **Eftirlønaravsetingar**

Sum trygd fyri eftirlønaravsetingunum, eru skrásettar ognir fyri 365,8 mió. kr.